Álit

í

løgtingsmáli nr. 99/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving (Tilbúgvingarlógin) (Heimild at skipa kommunal tilbúgvingarøki, stovnseta ein vaktsentral, skipa Kreppuráð og Átaksráð og gera tillagingar)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 6., 8. og 15. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Landsfelagið fyri Bjargingafeløgini, Felagið Sløkkiliðsleiðarar, Kommunufelagið, Føroya Tele, Føroya Politi, Arbeiðseftirlitið, Tilbúgvingarráðið, Vørn, MRCC og Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørt Samuelsen, Henrik Old, Bjarni Kárason Petersen og Bjarni Hammer) hevur hesar viðmerkingar:

Meirilutin stuðlar tankanum við uppskotium um at styrkja tilbúgvingina við betri samskipan, men heldur ikki, at valdi leisturin er hin rætti. Ætlanin er at geva landsstýrismanninum heimild at seta á stovn ein kommunalan vaktsentral, sum kommunurnar skulu eiga og reka. Hesin almenni stovnur skal koma afturat teimum vaktsentralum, sum longu eru.

Meirilutin heldur tað vera av stórum týdningi, at ein stovnur, sum kommunurnar skulu eiga, gjalda og reka, verður skipaður í tøttum samstarvi við kommunurnar. Hetta týdningarmikla politiska fyrireikingararbeiðið er lopið um, og Kommunufelagið mælir beinleiðis frá at samtykkja uppskotið, soleiðis sum tað fyriliggur.

Meirilutin heldur eisini, at rættast hevði verið at skipa ein felags vaktsentral, sum fevndi um allar tær eindir, sum í dag hava vaktarskipan í mun til tilbúgving. Fleiri hoyringarpartar hava víst á júst tað sama. Í dag virka, umframt Alarmsentralin 112, vaktsentralur hjá politinum, vaksentralur og vakteindir hjá sløkkiliðum kring landið og vaktsentralur hjá Landssjúkrahúsinum, sum ikki fevnir um lokalu sjúkrahúsini. Harumframt er MRCC, ið hevur ábyrgdina av bjarging á sjónum.

Í nevndarviðgerðini er komið fram, at tilbúgvingin sum heild riggar væl, og partarnir í tilbúgvingini eru sera ymiskir á máli um, hvørt tað er rætt at skipa ein kommunalan vaktsentral afturat teimum vakteindum, sum longu virka í dag. Summi meta hetta verða ein eyka lið, ið ikki fer at gera tað meira greitt í mun til ábyrgdarbýti og samskipan, ímeðan aðrir partar meta, at hetta fer at gera tað greiðari í mun til samskipan av átøkum og nýtslu av útgerð.

Í viðgerðini er aftur og aftur víst á, at tørvur er á at tryggja útbúgvingarstøðið fyri átaksleiðarar og lyklapersónar í tilbúgvingini kring alt landið. At tryggja hetta eigur at verða raðfest fremst. Tað, at landsstýrismaðurin fær heimild at leggja tilbúgvingarnar saman í størri fyrisitingarligar eindir, loysir ikki av sjálvum sær hesa avbjóðing.

Allar kommunur skulu gera neyvar váðametingar og hava nøktandi tilbúgvingarætlan fyri kommununa. Sambært Fiskimálaráðnum hava ikki allar kommunur gjørt tað enn. Landsstýrismaðurin eigur at streingja á, at tað verður gjørt, tí hetta er eitt neyðugt grundarlag undir vælvirkandi tilbúgving.

Meirilutin tekur undir við, at landsstýrismaðurin kann gera av, hvør samskiftisútgerð skal brúkast til tvørfakligt samskifti hjá pørtunum í tilbúgvingini. Hetta kann tó fara at áleggja fleiri pørtum munandi útreiðslur, og er støða ikki tikin til fígging av nútímans samskiftisútgerð í allari tilbúgvingini. Tað eigur at vera komið uppá pláss, áðrenn slík heimild verður givin. Spurnarntekin hevur eisini verið sett við, um metti kostnaðurin av kommunala vaktsentralinum er alt ov lágur.

Meirilutin minnir á, at ein fráboðanarsentralur má skipast soleiðis, at blind, deyv og fólk við skerdum kognitivum førleikum eisini fáa fráboðanir og eru við í tilbúgvingarætlanini, tá vanlukkur henda, eins og Almannamálaráðið vísir á í sínum viðmerkingum.

Meirilutin mælir landsstýrismanninum til sum skjótast at fara undir samráðingar og samstarv við kommunurnar um ein møguligan felags vaktsentral og onnur átøk at styrkja tilbúgvingina kring landið.

Meirilutin metir ikki, at hetta lógaruppskot er búgvið at seta í verk og mælir tí Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jákup Mikkelsen, Johan Dahl og Beinir Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað hevur í mong ár av skiftandi landsstýrissamgongum verið eitt mál at fáa samskipað tilbúgvingarøkið í samstarvsøkir uttan at komið er á mál. Vit hava kring landið nógvar eindir, sum hvør sær gera eitt sera stórt arbeiði, umframt tey bjargingarfeløg, sum sjálvboðin eru við til at tryggja økjunum góða tilbúgving.

Fleiri av teimum, sum hava verið inni til hoyringar um uppskotið, hava mælt til, at tað verður lagdur meira dentur á útbúgving og eftirútbúgving innan økið, og tað vilja vit heita á landsstýrismannin saman við kommununum at fáa skipað eisini og um somu leið eisini verða virkin at finna figging til hetta endamál, so bæði land og kommunur bera kostnaðin.

Minnilutin metir eisini tað vera skilagott, um samskiftisnetið ella samskiftisútgerðin er tann sama, sum allar eindir brúka, tað veri seg brandstøðir, bjargingarfeløg, heilsuverk, MRCC ,Vørn, løgreglan og aðrir viðkomandi partar, so tvørfakligt samskifti kann fara fram uttan trupulleikar uttan mun til, hvar í landinum ein er staddur, tá vanlukkur henda. Vit eru vitandi um, at slík skipan hevur ávísan rakstrarkostnað við sær og heita vit á landsstýrismannin eisini her at gera sítt til, at landið verður við til at bera part av kostnaðinum.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 19. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	